## Fundur um ættleiðing

Hóskvøldið 1. februar kl. 18.30 heldur Ættleiðingarfelagið í Føroyum fund á Hotel Hafnia. Við á fundinum verða Marianne Wung-Sung, varaleiðari, Mette Garnæs, sosialráðgevi, og ein føroysk familja, sum fyri stuttum hevur verið í Kina eftir einum barni. Greitt verður frá ættleiðingartilgongdini, hvaðan børnini koma, og hví tey eru leysgivin til ættleiðing. Fundurin er ætlaður teimum, sum umhugsa ættleiðing, men øll eru vælkomin.

## Gott ár hjá BMW

Árið í fjør royndist so væl hjá týsku bilverksmiðjuni BMW, at tað var tað besta í søgu felagsins. Fyritøkan seldi í fjør 1.370.000 bilar ella fimm prosent fleiri enn árið fyri, og tað gav 668 mia. krónur í kassan. Norbert Reithofer, nevndarformaður, sigur, at fyritøkan væntar eitt uppaftur betri úrslit næsta ár, tí tá fer sølan ætlandi upp um 1,4 mió. bilar, sigur hann. Tað er serliga 3-røðin hjá BMW, sum stendur seg væl á marknaðinum.

# -Bill kundi brúkt ein samkyndan spindoktara

**- Um vit samkyndu duga so væl at ávirka føroysku tíðindafólkini, sum hann vil vera við, átti Bill Justinussen av álvara at umhugsa at fingið sær ein samkyndan spindoktara, sigur Sonja Jógvansdóttir, fyrrverandi tíðindafólk og virkin limur í Friðarboganum**

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Í samrøðu við Sosialin í gjár segði Bill Justinussen seg hava varhugan av, at fleiri samkynd høvdu tætt tilknýti til føroyska tíðindaheimin, og at hetta hevur havt við sær, at føroysk tíðindafólk m.a. valdu síðu í málinum um grein 266 B.

Sonja Jógvansdóttir er kanska ein teirra, ið løgtingsmaðurin sipar til. Hon er samkynd og starvaðist á júst Dimmalætting fyri tveimum árum síðani. Hon hevur fleiri ferðir verið í fjølmiðlunum og gjørt viðmerkingar um mál, ið viðvíkja samkynd. Í dag arbeiðir hon enntá sum miðlaráðgevi hjá tveimum arbeiðarafeløgum fyri at betra um samskifti millum feløgini og føroysku miðlarnar.

Men fyrrverandi blaðfólkið á Dimmalætting vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til ákærurnar frá miðfloksumboðnum.

- Eg hevði hug at smílast í gjár, tá eg las samrøðuna. Tað er gott at vita, hvørjar bardagar, ið verdir eru at taka. At ákæra føroysku fjølmiðlarnar er ikki ein klókur bardagi, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Hon leggur speiskliga afturat, at løgtingsmaðurin átti at fingið sær ein samkyndan spindoktara at hjálpa sær.

- Um vit samkyndu duga so væl at ávirka føroysku tíðindafólkini, sum hann vil vera vera við, átti Bill Justinussen av álvara at umhugsa at fingið sær ein samkyndan spindoktara, heldur Sonja Jógvansdóttir speiskliga fyri.



Tíðindaleiðarin í Útvarpinum:

# Púra burturvið

**Johann Mortensen, tíðindaleiðari á útvarpsdeildini hjá Kringvarpi Føroya, heldur skuldsetingarnar hjá Bill Justinussen vera púra burturvið**

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*



- Tað er skelkandi, at ein politikari kemur við tílíkum ákærum.

Tað sigur Johann Mortensen, tíðindaleiðari á útvarpsdeildini hjá Kringvarpi Føroya um viðmerkingarnar hjá Bill Justinussen, sum í Sosialinum í gjár millum annað nevndi Útvarpið sum verandi ein miðil, ið hevur valt síðu í málinum um 266 B. Bill Justinussen vísti á skeivleikan í, at ein tílíkur almennur fjølmiðil við lógarásettum kringvarpsgjaldi gekk ímóti tí, sum ein stórur partur av fólkinum heldur.

Hesum heldur tíðindaleiðarin vera púra burturvið, og hann vísir samstundis aftur, at tey hava valt síðu í málinum um 266 B.

- Vit taka tey mál upp, sum vit halda hava tíðindavirði. Vit lata okkum ikki ávirka – hvørki av samkyndum, politikarum ella øðrum, staðfestir Johann Mortensen.

Í samrøðuni við Sosialin nevndi Bill Justinussen møguleikan fyri, at Kringvarpið – eins og tann almenni fólkaskúlin – verður bygt á ta kristnu siðalæruna. Hendan møguleika heldur tíðindaleiðarin óneyðugan.

- Kristið grundarlag ella ei, føroyski tíðindaflutningurin fylgir teimum grundleggjandi journalistisku grundreglunum, ið gera seg galdandi fyri góðan óheftan tíðindaflutning. Tað kemur upp á tal, at nakar fer at sensurera eitt blað ella ein almennan tíðindamiðil í Føroyum í dag, sigur Johann Mortensen.

# Árni Gregersen ongar viðmerkingar

**Komandi ábyrgdarblaðstjórin á Dimmalætting vil ikki siga, um hann fer at lurta eftir ráðunum frá Bill Justinussen**

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*



- Eg taki við starvinum sum ábyrgdarblaðstjóri 1. apríl, og áðrenn tað havi eg ongar viðmerkingar.

Tað sigur Árni Gregersen, komandi blaðstjóri á Dimmalætting, tá vit í morgun spurdu, um hann ætlaði at fylgja ráðunum, sum løgtingsmaðurin Bill Justinussen hevur givið honum í eini heilsan í bløðunum í gjár.

Bill Justinussen staðfestir millum annað í heilsanini, at ein orsøk til, at Dimmalætting hevur havt so tungan rakstur seinastu tíðina, millum annað kemst av nýggju redaktionellu linjuni hjá blaðnum, har bæði oddagreinir og blaðfólk hava niðurgjørt tey, ið eru ímóti grein 266 B.

Í heilsanini gevur Bill Justinussen komandi blaðstjóranum trý ítøkilig ráð. Hann biður hann millum annað um at gevast við at skriva niðurgerandi um kristnu virðini í samfelagnum og at gevast við at ganga ørindi fyri máttmiklar sonevndar "minnilutabólkar".

Núverandi ábyrgdarblaðstjórin, Ingi Samuelsen, hevur longu svarað ákærunum. Í aftursvari í Dimmalætting í gjárkvøldið undir heitinum "Hvat billar Bill sær inn?", vísir blaðstjórin ákærunum aftur og kallar tær fyri "pástandir uttan hald í veruleikanum" og beinleiðis "ósannindi".